Vikublaðið Sosialurin



## Nøkur orð til minnis um

# Eleonoru (Noru) og Hans Chr. Joensen (Hassa)

## bóndahjún Heimi í Stovu , Á Ryggi í Miðvági

Leygardagin tann 17. juni 2006 andaðist Hans Chr. Joensen (Hassi) bóndi Heimi í Stovu í Miðvági 80 ára gamal. Hassi var føddur tann 2. juli 1925. Hann var sonur bóndahjúnini Sofiu og Jógvan Joensen og fjórðelstur av átta systkjum. Trý tey elstu doyðu á ungum árum. Elsebeth Johanne f. 12. sept. 1918 var elst. Hon doyði 20. apríl 1933 bert 14 ára gomul. Nicolina f. 6. mai 1920 var næstelst. Hon doyði 26. juli 1950, 30 ára gomul. Hon hevði tá mist mannin Kaj, sum doyði 21. nov. 1948 og sonin 27. feb. 1948. Jógvan Pól f. 25. jan. 1923 var triðelstur, men fyrstføddi drongur og tí borðin til garðin. Hann doyði 2. feb. 1937 bert 14 ára gamal. Hini systkini eru Marius, sum doyði 26. sept. 1999, Brynhild, Ian og Elsipa Jóhanna. Hassi festi garðin Heimi í Stovu.

Á ungum árum fór Hassi til Jæren í Noreg á landbúnaðarskúla. Tá hann kom aftur, fór hann at nútímansgera garðin. Hann fekk sær sláimaskinu, sum var drigin aftaná tveimum hestum. Áðrenn tað, var alt grasið sligið við hond. Nógvir av teimum gomlu hildu lítið um at hann fór við so stórum og tungum amboðum í bøin, men væl gekk, hann fekk sligið tann besta bøin við rossum og spardi nógv strev.

Hassi útviklaði plógvið, sum enn verður nýtt nógvastaðni í Føroyum at pløga til eplaveltur (reimaveltan ella Miðvágsveltan) við. At hjálpa sær hevði hann Tórstein Niclasen, sum var sera góður smiður. Tað fyrsta plógvið var so væl gjørt, at tað verður nýtt enn.

Eisini fekk Hassi sær súrhoyggjbrunn. Hann tók eitt kúfóður. Brunnurin stendur enn vestanvert húsini Heimi í Stovu. Hann er laðaður av gróti og stoyptur innan. Brunnin vóru hoyfólkini sera glað fyri, tí so slapst undan at hoyggja tað fóðuri, og tað lætti væl um. Seinni bygdi hann fjósið, sum verður brúkt í dag.

Hann hevði sera gott hegni til jarðarbrúk. Serliga hevði seyðurin hansara stóra áhuga. Mangur maður hevur staðið undrandi á Norðaraleitisrætt og lýtt á, meðan Hassi og Ian tosaðu um seyðin í rættini, tí teir kendu so at siga hvønn seyð og vistu, hvar hann gekk.

Úrslitini frá seyðasýningunum søgdu eisini týðuliga, hvussu gott skil teir høvdu fyri seyði. Brundseyðirnir á Norðaraleiti vóru altíð millum teir bestu, og nógv steypini hevur Hassi vunnið fyri tað.

Hann var nógv nýttur sum djóralækni í bygdini, serliga áðrenn umstøðurnar hjá djóralæknanum at ferðast um landið vóru so góðar, sum í dag. Sum tann hjálpsami maður hann var, so segði hann ongantíð nei, um hann kundi veita eina hjálpandi hond.

Bøin røkti Hassi væl og onkur hevur tikið til, at tey seinnu árini hevur tað næstan bert verið Hassi, sum hevur snøggað bakkar tá hann slegði, hóast hann hevði tann størsta bøin í bygdini og var komin upp í árini.

Bjørgini røkti Hassi frá hann var 15 ára gamal. Á yngri árum plagdi hann at verða við á fuglaveiðu í Urðini. Hann hevði seyð í nógv ár bæði á Urðini og í Ryggskorð.





Tey seinnu árini var hann tó bert í Rygsskorð, har hann var seinastu ferð eftir seyði á heysti í 2003. Nógv minnast hann ivaleyst frá filminum, sum Zacharias Hammer tók upp í Rygsskorð, har hann greiddi frá.

Á yngri árum var Hassi ítróttarmaður, sum so mangur annar. Hann spældi fótbólt og róði við áttamannafarðinum Miðvingi tey árini síðst í fimti- og fyrst í sekstiárunum, tá Miðvingur vann mest sum allar róðrarnar, hann luttók í. Hassi var ein av stigtakarunum at seta á stovn Miðvágs Róðrarfelag. Hann sat í fyrstu nevndini saman við Ian Joensen og Tórstein Niclassen. Teir savnaðu saman við bygdafólkinum inn pening og keyptu fyrst áttamannafarið Miðving í 1957 og síðan dreingjabátin Beintu árið eftir. Hann sat í nevndini í Miðvágs Róðrarfelag til einaferð fyrst í sjeytiárunum.

Miðvingur var fyrsti bátur, sum tann navnframi bátabyggjarin Niclas í Koltri bygdi og millum fyrstu bátar í Føroyum, sum var bygdur bert til kappróður.

Hassi var vertskapsmaður av teimum bestu og ein heiðursmaður. Um hann kundi ein av røttum siga sum skaldið Rasmus Effersøe: "Trúfastur altíð var maður, vildi ei bróta sítt orð, í vertskapi fróður og glaður við egið sum við annans borð. Ei vin í neyð teir gloymdu, æran var teirra mið, og hana so væl teir goymdu alt eftir Norðmanna sið."

Mong eru tey, bæði yngri og eldri, sum hava sitið væl Heimi í Stovu, tí hann var sera blíður maður. Har kom eisini nógv fólk í húsið at vitja.

Hassi var við at byggja dansistovuna Gleimur saman við Godtfred Joensen, Jógvan Erland Joensen, Aggrim Svabo, Andreas Johansen, D.P. Danielsen, Kaj Danielsen, Steingrim Nattestad, Tórstein Niclasen, Grækaris Poulsen og Hans Mohr Hansen.

Hann var ein góður kvøðari, og plagdi at skipa til dans. Hann var limur í Vága Dansifelag og dansaði við, til kort áðrenn hann doyði.

Hassi giftist í 1977 Eleonoru Garðshorn ættað úr Elduvík. Tey fingu børnini Jógvan í 1979 og Elspu Suffíu í 1981, eisini hevur Kjartan búð hjá teimum í fleiri ár.

Eleonora, ella Nora, sum hon var kallað, var fødd 21/10-1939. Hon doyði alt ov ung 05/11-2003 bert 64 ára gomul. Hon var dóttir Elspu og Jógvan Garðshorn.

Nora var eitt sera fitt og vinsælt fólk, men hon segði altíð sína meining um tingini. Hon kom til Miðvágs at arbeiða á Ellis- og Avlamisheiminum. Tað var skjótt, at hon kom í samband við bygdafólkið her. Hon hevði eitt stórt hjartað, og tosaði við øll. Møtti tú henni, fekst tú altíð eitt smíl og nøkur blíð orð frá henni. Hon gjørdi ikki mun á høgum og lágum, og hevði sera stóran áhuga í øllum, sum rørdi seg í samfelagnum.

Nora sat í skúlanevndini í nógv ár. Eisini var hon ein av drívkreftunum hjá Vága Dansifelag við at fáa sett Beitishúsini í stand at nýta sum felagshús. Tað munna verða nógvir dagarnir at hon, saman við øðrum, nýtti at savna inn pening til Beitishúsini, tí nógv skuldi til at seta eini gomul hús í stand, serliga tí byggisniðið var gamalt.

Nora var ein góð bóndakona og lætti sera nógv um arbeiði á garðinum. Við sínum ljósa lyndi og vinsæla og blíða verumáta, fylti hon sera nógv upp, har hon var. Tí er tómrúmið eyka stórt, nú hon ikki er meira.

Tá eg hugsi um Noru, kann eg ikki lata vera við at hugsa um sálmin: "Guð, ger meg til eitt lítið ljós." Har stendur so nógv í, sum passar uppá Noru. Hon var sum eitt blomstur blítt, sum brosaði øllum mót. Hon var sum eitt signað lag, sum lívgaði hug og sál. Har hon var, skapti hon lív og gleði, hon hevði tað bara í sær.

Tá vit fóru á fjall á Norðaraleiti, hevði hon altíð morgunmatin kláran til fjallfólkið áðrenn farið var. Eisini var matur klárur at hava við. Tá vit komu aftur av fjalli, kundi fjallskipanin sessast við búgvið borð í stovuni, og har var einki spart, altíð besti bóndamatur. Tá vit flettu, var hon eisini har, gjørdi mat til flettingarmenninar og tók sær av avroðunum. Var Hassi onkustaðni, á fjalli ella tað var í hoyna, so mjólkaði hon. Ikki vóru krøvini stór til frítíð, eina viku um Ólavsøkutíð var ferian um árið, tá høvdu tey so gott sum einki vikiskifti fríð alt árið.

Tey fingu nøkur góð ár saman tað tíð teimum untist. Tó tey seinastu vóru sera stríggin. Fyrst var Nora rakt av hervuligari sjúku, og meðan hon gekk sjúk, var eisini Hassi raktur av somu ringu sjúku. Meðan Nora stríddist her, var han noyddur at fara til Danmarkar at leita sær heilsubót. Hann kom tó upp at vera saman við henni tað seinastu vikuna, hon hevði her á fold, men noyddist niðuraftur til viðgerðar stutt eftir jarðarferðina. John hevur verið ein sera stórur stuðul hjá Hassi í hesi torføru tíð, tí hann var niðri við honum alla tíðina. Her vísti Hassi eina ótrúliga sálarstyrki. Hann kom fyri seg av sjúkuni og við at taka arbeiðið uppaftur og royna at liva víðari, eggjaði hann samstundis børnunum at menna seg upp eftir tann svára missin.

Hassa havi eg kent alt mítt lív. Tey bæði fyrstu árini av lívinum búði eg har niðri, og so leingi omma livdi, var eg líka nógv har um dagarnar, sum hjá okkum. Mín áhugi fyri jarðarbrúki hevur altíð verið stórur, og hettar førdi við sær, at Hassi og eg komu at vera nógv saman, serliga áðrenn hann sjálvur fekk børn.

Hann hevði okkum smádreingirnar við at reka neytini. Tá eg var smádrongur, vóru neytini rikin í hagan um morgunin og rikin heim aftur um kvøldið. Tað, sum okkum børnum dámdi best, var fyrsta dagin neytini komu út um várið, hvussu lívlig tey vóru, og so at sita hjá teimum í haganum inntil tey vóru rikin heim um kvøldið.

Hann hevði okkum við í torv bæði úti í Nípu, í Líðini og á Kvígandali. Eg minnist serliga hvussu nógv fólk vóru burtur í torv á Kvígandali. Har vóru fólk so langt eygað rakk og so vóru nógvir sørvingar hinumeðan ánna á Norðurtriðingi. Eg minnist tá vit førdu torv úr Nípuni, hvussu laðin báturin var, bert eitt hálvt borð var eftir, so ansast mátti eftir, ikki at fáa nakran skvamp.

Hann hevði okkum við í grind bæði í Miðvági, Tindhólmi og Bø. Tey fyrstu árini var tað við Rygsbátinum við árum. Hann hevði okkum við í hoyggj. Tað var stuttligt viðhvørt, serliga tá vit skuldu koyra saman, ella tá vit sluppu í hestavognin og seinni traktorin. Ikki tímdu vit altíð so væl at hoyggja, ivaleyst tí tað var so nógv, at so stórur partur av sumrinum fór til hoygging. Onkuntíð sníktu vit okkum vekk, tá veðrið var gott og hugurin lítil. Tá kundu vit fara at fanga síl, spæla bólt og tílíkt, allir uttan Jógvan hjá Marius, hann hoyggjaði sum ein maður frá heilt ungum árum.

Hassi hevur altíð dugað væl við børnum og fólki sum heild. Tí vóru altíð nógv børn í fjósinum. Ja nógv eru tey, bæði eldri og yngri enn eg, sum hava nógvar góðar upplivingar at minnast á saman við Hassa, og nógv eru tey, sum hava havt sína dagligu gongd í fjósinum hjá honum í barnaárunum. Tað høvdu ikki verið nógv vaksin, sum høvdu tolað tað vas og tann gang, sum mangan var, tá vit koyrdu súrhoyggj. Sjálvur dámdi mær væl at vera í bønum saman við Hassi og har havi eg brúkt nógvar summarfrítíðir við gleði. Har var ongantíð keðiligt, Tað var altíð áhugavert at tosa við Hassi, hann hevði eina útrúliga vitan um føroyska mentan, og hann var ongantíð liðugur at greiða frá.

Hann hevði okkum við á fjall, serliga á Heimaraleiti og Norðaraleiti. Serliga væl dámdu okkum at verða eftir gimbralombum, tí tey vóru ikki rikin í rætt, tá eg var smádrongur, men tikin í haganum. Tá sluppu vit at renna, og spenningur var í, men ikki var altíð so stuttligt at leiða tey heim, tí ofta var langt og Hassi skuldi taka fleiri, meðan vit máttu leiða.

Flettingin var hæddarpunktið á árinum hjá mongum av okkum. Ian og Hassi flettu tveireinir í kjallarinum hvørt kvøld í vikuvís. Nógv fólk gekk inn á gólvið at práta. Har var altíð fult og væl dámdu okkum yngru at sita undir tí, teir eldru tosaðu um. Hvørt lamb bleiv handlað, áðrenn tað var dripið, og mett var um, hvussu tað fór at roynast. Har var ein serligur dámur, eitt sosialt umhvørvið, sum eg sakni, nú alt skal ganga so skjótt, og eingin hevur tíð til hvønannan longur.

Hassi bleiv ongantíð gamal, hóast hann gjørdist 80. Hann arbeiddi til tað síðsta, gekk á fjall, var í bønum og í fjósinum. Havi mangan hugsað um, hvussu hann kundi halda sær so væl, tí hann hevði so strævið arbeiði. Hann dugdi sera væl at leggja arbeiðið tilrættis. Hvønn dag eftir døgurða fekk hann sær ein lítlan blund, bert fáar minuttir, eisini í hoyna. Man tað vera ein partur av loyndarmálinum? Eisini hevði Hassi eina sera sterka og einfalda gudstrúgv. Hendan trúgv hevur stiðjað hann væl gjøgnum lívið, serliga tá mótgangurin var stórur. Hann ivaðist onga løtu í, hvar hann fór, tá hettar lívið var at enda komið.

Hassi doyði, sum hann livdi, hann var ein maður sterkur sum stál, tríggjar vikur áðrenn hann doyði, hevði hann verið vikuskiftistúr í Mykinesi við vinfólkum. Tá hevði hann strevað seg heilt niðan á Knúk, sjúkur sum hann var. Tosaði við hann í túninum, tá hann var komin aftur, tá helt hann, at hann mátti fara at ganga meira, fyri at koma í betur venjing. Eina góða viku áðrenn hann doyði, var hann í bønum og fekst við rótakál. Stál bognar ikki. Tá ov nógv stendur á, støkkur tað. Tað var tað sum hendi við Hassi. Tað vardi meg ikki, at hann skuldi fara so skjótt.

Síðan eg flutti hinumegan land oman á Kirkjabø, havi eg hvønn dag hugt niðan á bøin hjá Hassi fleiri ferðir um dagin. Sæð hann grivið rennur um veturin, pløtt, velt og sáað bøin um várið, sligið og koyrt gras um summarið, tikið upp eplir um heystið. Nú kemur hann ikki meir í bøin, Hassi hevur gingið síni seinastu spor her á fold.

Tómrúmið er stórt eftir tey bæði, sum vóru ein so stórur partur av lívi mínum. Tó ringast er hjá tykkum Jógvan, Elspu Suffía og Kjartan, sum á so ungum árum hava fingið so stórar brotasjógvar. Tó skrivað stendur í halgubók, at harrin leggur ikki størri byrðar á okkum, enn vit eru ment at bera, so hjálpi hann tykkum at bera ta tungu lagnu, tit hava fingið. Brúkið Noru og Hassi sum fyrimynd, so skal nokk gangast tykkum væl.

Friður veri við minninum um Noru og Hassa.

**Georg**